

## Rás2 sendir frá finaluni í Kafé Kaspar leygarkvøldið

Leygarkvøldið frá kl. 21.30 til 24.00 sendir Rás2 beinleiðis frá Hotel Hafnia, har finalan í ársins singer/songwriter kapping er á Kafé Kaspar. Vertir eru Barbara Holm og Mirjam Pætursdóttir.

# Fleiri fyrimunir á Fróðskaparsetrinum

**UNIVERSITETSÚTBÚGVING Ein av fremstu fyrimununum við at velja Fróðskaparsetrið fram um útlendsk universitet er, at flokkarnir eru smáir, og at lærararnir tí hava nógv betri tíð til hvønn einstakan lesandi**

Leo Poulsen

Nógv hevur verið sagt og skrivað um Fróðskaparsetrið seinastu árini, og við skiftandi samgongum er skiftandi dentur lagdur á at styrkja heimligu útbúgvingarnar.

Møguleikarnir seinnu árini fyri ymiskum útbúgvingum hevur verið vaksandi, og føroyingar síggja góðar møguleikar í at gera sín lesnað í Føroyum.

Ein teirra er Eirikur Lützen, sum er lesandi innan KT-verkfrøði á øðrum ári, og hann sigur soleiðis um avgerðina at lesa á Fróðskaparsetrinum heldur enn á universiteti uttanlands:

- Tá eg fór at leita eftir universitetum sum bjóða fram KT-verkfrøði, byrjaði Fróðskaparsetrið at bjóða tað sama. Tí var tað ein løtt avgerð fyri meg at lesa í Føroyum.

Hann heldur, at tað finnast fleiri fyrimunir við at lesa í nærumhvørvinum.

- Fyrst og fremst eru flokkarnir lítlir, og tað merkir, at lærararnir hava nógv betri tíð til hvønn einstakan lesandi. Hartil hevur tað víst seg, at lærararnir eru ógvuliga hjálpsamir, eisini um tað er uttan fyri teirra egna fak. Tú kanst næstan siga, at teir taka sær tíð til einatímar, sigur Eirikur Lützen.

Hann vísir eisini á, at við at lesa í Føroyum nýtist tær ikki at byggja upp eitt nýtt sosialt netverk, og fakliga er Fróðskaparsetrið minst á støði við universitet uttanlands.

- Eg var og vitjaði eitt universitet í Rio de Janeiro, og sjálvt um hetta var eitt av teimum smærru universitetunum, bar væl til at villast. Eg sat eisini inni í nøkrum tímum, og fakliga eru vit í Føroyum minst á teirra støði, sigur Eirikur Lützen.

### Ynskiligt við kollegie

Tað eru vælsaktans tey fægstu sum vita, at Fróðskaparsetrið eisini umfatar útbúgvingarnar til pedagog, lærarar og sjúkrarøktarfrøðingar, men so er. Hetta merkir eisini, at samlaða talið av lesandi á Fróðskaparsetrinum liggur um 450, og eftir summarfrítíðina vóna og vænta tey, at talið fer upp um 500.

- Vit rokna við 200 nýggjum lesandi eftir summarfrítíðina, og við teimum umleið 150, sum verða liðug í summar, vænta vit, at komandi skúlaár verða tað 500 lesandi á Fróðskaparsetrinum, sigur Rúna Hjelm, setursskrivari.

Í flokkinum, har Eirikur Lützen gongur, eru fýra lesandi eftir at teimum 12, sum byrjaðu fyri tveimum árum síðani.

- Men tað er púra vanligt, at fólk falla frá. Tey eru mong, sum ikki reiðiliga vita, hvat tey vilja, og so prøva tey seg bara fram, sigur Eirikur Lüten.

Hann sigur, at útbúgvingin er nakað broytt síðani hann byrjaði fyri tveimum árum síðani.

- Nú verður minni dentur lagdur á støddalisfrøði og elektronikk, og meiri dentur lagdur á software, sigur Eirikur Lützen.

Tað er kortini eitt øki, at hann kundi ynskt sær betri umstøður.

- Vit mangla eitt kollegie, har tey lesandi kunnu búgva. Sum nú er, er tað ein fyrimunur hjá havnarfólkii at lesa á Fróðskaparsetrinum. Áðrenn undirsjóvartunnilin til Klaksvíkar kom var ein lesandi, sum mátti upp klokkan fimm hvønn morgun, fyri at taka ferjuna yvir til Leirvíkar. Tó skal sigast, at frástøðan minkar alsamt, og tað gerst lættari og lættari at búgva aðrastaðni og lesa í Havn, sigur Eiikur Lützen.

leo@sosialurin.fo



**VIÐMÆLI**

*Eirikur Lützen, sum lesur til KT-verkfrøðing, viðmælir av fullum huga ungum føroyingum at lesa á Fróðskaparsetrinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Útbúgvingarnar á Fróðskaparsetrinum 2010:**
*Lívfrøði, Jarð- og havfrøði, KT-verkfrøði, Lærari, Námsfrøði, Sjúkrarøktarfrøði, Samfelagsvísindum, Søga og Stjórnmálafrøði.*

### Kunningartiltak í Miðlahúsinum 6. mai kl. 19.30

**Fyribils skrá:**

| | |
|---|---|
| kl. 19.30 | Tónleikur við Guðrið Hansdóttir og vælkomst við rektaranum Jóan Paula Joensen |
| kl. 19.45 | Føroyamálsdeildin |
| kl. 20.00 | Føroya Læraraskúlin |
| kl. 20.15 | Náttúruvísindadeildin |
| kl. 20.30 | Tónleikur |
| kl. 20.45 | Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya |
| kl. 21.00 | Søgu- og samfelagsdeildin |
| kl. 21.15 | Spurningar og tónleikur við Guðrið Hansdóttir |
| kl. 21.45 | Liðugt |